

# VÁGA FLOGHAVN

## Aðalfundur í Vága Floghavn

**Mikudagin 12. mars** var aðalfundur í P/F Vága Floghavn. Fundurin varð hildin í hølinum hjá Vága Floghavn vestri í Vágunum. Nevndin varð øll afturvald.

**Í nevndini sita:**
- Kitty May Ellefsen, nevndarforkvinna
- Andras Róin, næstformaður
- Árni Arge, nevndarlimur
- Johan í Niðristovu, nevndarlimur
- Evy Jacobsen, nevndarlimur

Nevndin bíðar enn eftir heimild frá tinginum áðrenn verðuliga kann farast í gongd við, at útbyggja Vága Floghavn. Á aðalfundinum greiddi nevndin landsstýriskvinnuni frá, at nevndin er til reiðar at fara til verka og at nevndin metir, at lógaruppskotið, sum varð sent niðan í tingið í 2007 er eitt gott útgangsstøði.

UTTANRÍKISRÁÐIÐ

## Skrivari

Í Uttanríkisráðnum er starv sum avloysari fyri skrivara í barnsburðarfarloyvi leyst at søkja. Starvið verður sett skjótast til ber og heldur fram til **30. november 2008.** Seinni verður avgerð tikin, um starvið verður umskipað til fast starv.

Skrivarin fer at taka sær av skrivarauppgávum og málsviðgerð í Uttanríkisráðnum, protokollmálum og luttaka í ymsum verkætlanum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava skrivstovuútbúgving, aðra samsvarandi útbúgving ella viðkomandi útbúgving á bachelorstigi. Vit vænta eisini, at tann, ið settur verður, er stinnur í føroyskum og enskum máli, hevur politiskt tev og góð samstarvsevni, er tænastuhugaður og lagaligur, er miðvísur og sjálvstøðugur.

Starvið verður sett samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Uttanríkisráðið er í støðugari menning og tann, ið settur verður, skal tola broytingar í starvinum.

Vinaliga setið tygum í samband við Barbaru á Tjaldrafløtti á telefon +298 351010 ella +298 551040, at frætta meira um starvið. Umsóknir við prógvum og øðrum skjølum skulu sendast til Uttanríkisráðið, Tinganes, FO-100 Tórshavn ella í telduposti til info@tinganes.fo og vera frammi í seinasta lagi **mánadagin 14. apríl 2008.**



SEV

## Kundi tú hugsað tær starv hjá SEV?

*Tvey størv sum linjufólk á byggitoyminum eru leys at søkja, til setan skjótast tilber.*

**Starvið**
Tú kemur at arbeiða í einum toymi, ið hevur alt landið sum arbeiðsøki. Arbeiðsuppgávunar hjá toyminum eru viðlíkahald og nýgerð av el-kervinum hjá SEV.

Toymið arbeiðir útfrá verkstaðnum hjá SEV í Skálabotni.

**Førleikar**
Tað eru eingi serstøk krøv til úbúgving. Vit skipa fyri neyðugum skeiðum. Vit vænta at tú hevur góð evni at samskifta og samstarva og ert fyrikomandi.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við møguligum ummælum til:

**Elfelagið SEV**
**Postrúm 319**
**110 Tórshavn**

Umsóknarfreistin er **hósdagin 3. apríl 2008.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jón Nielsen á telefon nr. 346800.

Elfelagið SEV

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI
Grønlandsvegur 58. Boks 1216 . FO-110 Tórshavn
Tlf. +298-317959 . Telefax +298-317909 e-mail ffk@post.olivant.fo
The Faroese Cancer Society

Aðalfundurin hjá
Føroya Felag Móti Krabbameini

**verður í Listaskálanum
týskvøldið 15. apríl kl. 19.00**

**Kl. 20.00 verður almennur fyrilestur v/ Rodmundi í Liða, fyrrverandi yvirlækna.**

**Fyrilesturin hevur heitið:**

**Lækni, sum sjúklingur**

**Øll eru vælkomin**

**Føroya Felag Móti Krabbameini**

ASK

# TOEFL-roynd

## leygardagin 3. mai 2008

## (Test of English as a Foreign Language)

Møguleiki er aftur at taka sonevndu TOEFL iBT-royndina í Føroyum. TOEFL-royndin er ofta upptøkukrav á hægri lærustovnum í ensktmæltum londum.

Royndin verður **leygardagin 3. mai 2008 kl. 12** á Fróðskaparsetri Føroya, Nóatúni 3.

Tilmeldingarfreistin er í seinasta lagi 8 dagar undan royndini.

**Tilmelding on-line fer fram á:** www.ets.org/toefl

**Kostnaðurin er 140 USD.**

| **Altjóða Skrivstovan** | **Fróðskaparsetur Føroya** |
|---|---|
| tlf. 322065 | tlf. 352500 |
| ask@ask.fo | setur@setur.fo |
| www.ask.fo | www.setur.fo |

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.

**Jørð í Sørvági**

Við hesum verður matr. nr. 103 a, Sørvágur lýst til sølu. Ognin er 2.573 m2 innangarðs. Umleið helvtin av ognini liggur í landbúnaðarøki og hin helvtin er lagt út til fríøki.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til **Fríðu Patursson, advokat, tel. 353335** ella **e-mail frp@jura.fo** ella skrivaran **Maibritt Johannessen, e-mail maj@jura.fo**

FRÚUTRØÐ 4 • POSTBOKS.6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 • FAX 35 33 36
WWW.JURA.FO

# BINGO

Bátafelagið á Bakka hevur bingo í húsunum hjá Eldrafelagnum Nón, leygardagin 22. mars kl. 18.00

Høvuðsvinningurin er ferð fyri tvey við Norrönu

Blokkar verða brúktir

**Bátafelagið á Bakka**